

Mynd: Beinta Haraldsen

at lurta og syngja við. Og tá er tað kanska ikki so umráðandi, hvat innihald er í tekstunum.

### Afrikanskar rútmur

Í introduktiónini á fløguhúsanum greiðir Jensina frá, tá ið hon hitti ein blýant, sum dugdi at tosa. Hetta er ein søga í sær sjálvum til børnini, sum snýr seg um, at hon hevur havt lætt við at fara til verka í arbeiðsgongdini. At tað fellir henni lætt hoyrist aftur í framførsluni.

Tá ið eg legði hesa fløguna í telduna hja mær, var tað fyrsta inntrykkið, at fleiri av sangunum hava element av afrikanskum tónleiki. Eg veit ikki, um hetta er tilvitað hjá Jensinu, men rútmikkurin, hon brúkar, hevur sín uppruna úr Afrika. Tað er mátin, Jensina spælir sínar repeterandi fingraspæls-ostinatar og mátin, hon leggur rútmisku áherðslurnar í sanginum. Hetta gav mær ábendingar um til dømis Miriam Makeba og Anjelique Kidjo.

Hon leggur fyri við lagnum Dingdang Pappsang. Afro leisturin heldur fram í løgunum "Hokus Pokus Filipp Tomm" og "Ganga Ganga". So kemur lagið "Bang Bang", sum snýr seg um ein lítlan kovboyara, sum fekk ein hest í jólagávu. Tá er tað jú upplagt at brúka country sjangruna sum referansu. Country sjangran heldur fram við Føðingardagsbamsuni, sum er kryddað við einum steel-gittara, sum kanska er heldur trevsutur í kantunum og tí neyvan kann sigast at vera fyrsta ljóðførisval hjá gittaristinum Janusi Kampmann. Men endamálið við hesum hevur helst verið at geva lagnum eitt so drynjandi bygdasligt og kvøðuljómakent ljóð sum gjørligt.

Vakra lagið "Onga tíð" snýr seg um, at hvørki mamma ella babba hava tíð til barnið, sum má taka til takka at spæla við lítlabeiggja ístaðin. Hetta lagið og løgini "Beinta" og "Blómubilur" hava eina meiri lyriska (sangbæra) tilgongd. Afrostílurin kagar fram aftur við lagnum "Tá sólin kagar undan ský". Síðani heldur Jensina fram við acapella lagnum "Au, mín tá".

"Kiskan hjá Kissa" er eitt einfalt lag við akkustiskum



Føðingardagsbamsan

Tá eg fylti fýra, pakkapostur kom til mín.
Hann var sendur heilt úr Mongolinum.
Í honum lá ein bamsa, ið hevði so fitt trýn,
fittari enn nakað í býnum.

Góða bamsa, góða bamsa,
tú ert tann allarbesta bamsa her í verð.
Fitta bamsa, góða bamsa,
tú ert tann fittasta bamsa her í verð.

Bamsan var brún, og hon segði: "I love you",
tá eg á búkin trýsti.

Tvey ár aftaná, tá e
var hon enn mín yn
Tá var hon full av h
ja, børn, tey hava ta

Góða bamsa....

gittara og kettumjarri í bakgrundini. Á lagnum "Saksofon", sum snýr seg um sopran-, alt-, tenor- og bassaksofonir er tað Hans Petur í Brekkunum, sum spælir tenorsaksofon. Saksofonin verður akkompagnerað av einari harmoniku, spæld av Finni Hansen, í lagnum "Tá vekjarin ringir". Í balladuni "Summardáar" er tað bassurin, sum traðkar fram. Tað síðsta lagið "Loyniliga loynihurðin" frá Dingdang Pappsang leggur fyri við einum Doobie Brothers kendum rútmugittara. og endar við einum "bye bye".

Sum heild ein væl samansett fløga.

### Børnini

Sum eitt "eksperiment" havi eg spælt fløguna fyri míni 8 ára gomlu døttur. Eg legði til merkis, at tað fall ein friður yvir hana, og hon hevði hug at fara at gera eitthvørt hondarbeiði, so sum at tekna, seyma ella klippa. Hetta við at lurta og gera onnur ting samstundis duga børn nokkso væl. Tá ið eg spurdi hana, hvør sangur er best á fløguni, svaraði hon sannførd: "Kovboysangurin"! Men eg rokni við, at børn eru sera ymisk, og at onnur børn avgjørt høvdu valt onnur yndisløg. Men annars var Føðingardagsbamsan framførd í skúlanum hjá dóttur míni, tá tey høvdu kvøldsetu herfyri. Hetta lagið vísti seg eisini at vera væl sangbart, og tað sá út til, at børnini høvdu tikið tað til sín.

Ikki tí - alt skal ikki snúgva seg um smag og behag, og hvat lag er best. Eg haldi sjálvur, at Jensina hevur gjørt eina góða barnafløgu, sum eg kann viðmæla øllum foreldrum.